## Starvsfólk
til Postverk Føroya

Søkt verður eftir skrivstovufólki til p/f Postverk Føroya at byrja skjótast tilber.

Starvið er avloysarastarv fyri fólk í farloyvi, og er í fyrsta umfari fyri ½ ár. Møguliga kann haldast fram í starvinum. Talan er um fulltíðarstarv.

Arbeiðsøkið verður í høvuðsheitum avgreiðsla av viðskiftafólki, men annað arbeiði kann eisini koma fyri. Arbeiðsplássið verður Meginposthúsið í Tórshavn, men viðkomandi skal kunna starvast á øðrum posthúsum eisini.

Førleiki: Ynskiligt er at tann sum settur verður, hevur skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi handilsliga útbúgving. FHS er ein treyt.

Einginleikar: Tú skalt duga væl at samstarva, vera kundavinarlig/-ur og dáma avbjóðingar.

Løn: Løn eftir sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Finngerð S. Hansdóttur tel. 346018 ella 212193.

Skrivlig umsókn verður í seinasta lagi 14. februar 2006 at senda til

Postverk Føroya
Postboks 3009
110 Tórshavn

Postverk Føroya

## B68 SKIPAR FYRI BASSA CUP



Dreingir og gentur, ið ætla sær við til Bassa Cup, sum B68 skipar fyri í Ítróttarhøllini í Runavík vikuskiftið 11. og 12. februar, skulu boða frá luttøku í seinasta lagi sunnudagin 5. februar.

Tilmelding á tel. 230022. Eisini ber til at senda teldupost til kim@lmf.fo

Aldursbólkarnir kunnu síggjast á www.b68.fo.

## Lastbilar til sølu

Scania 143/450 við retardara, 6x2, árg. 1991, presendingslast við alu-botni.

Scania 143/450, árg. 1989, Schmitz frystilast árg. 1996, kontainara-festir.

Volvo F10 við telma-bremsu, árg. 1986, bjálv. glastr. kassi, skjóti/-faldi lift 2500 kg. 390.000 km.

**Tlf. 212104**

## Vælkomin til missiónsviku
í Gøtu í døgunum
7-12. februar 2006

**Møtini verða í kirkjukjallaranum.**

*Skrá fyri møtunum*

**Týskvøldið 7. februar**
kl. 20.00 Martin Restorf Jacobsen talar
Bethaniakóri syngur

**Mikukvøldið 8. februar**
kl. 20.00 Regin Høgnesen talar
Essa Jacobsen syngur

**Hóskvøldið 9. februar**
kl. 20.00 Jóhan Hendriksen talar
Streingjakóri í KFUM og K úr Klaksvík syngur
Innsavnan til Heimamissiónina

**Fríggjakvøldið 10. februar**
*kl. 20.00 Margeir Toftegaard talar*
*Thaborkóri syngur*

**Leygarkvøldið 11. februar**
*kl. 20.00 Tey ungu skipað fyri*
*Pól Johannesen talar*
*Ungdómskóri á Glyvrum syngur*
*Innsavnan til nýtt missónshús*

**Sunnudagin 12. februar**
Kl. 12.00 Gudstænasta v/ altargongd
Martin Restorf Jacobsen.
Kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Kl. 18.00 Niels Jacob Nielsen, talar
Bethaniakóri syngur.

***Skipað verður fyri barnaansing fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið***

## Frá S & K felagnum

Aðalfundur felagsins verður í Havn á Hotel Tórshavn leygardagin 18. februar 2006 kl. 19.30. Dagsskrá sambært lógum felagsins.

1) Frásøgn formansins frá farna ári
2) Roknskapur til góðkenningar
3) Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
4) Val av formanni
5) Innkomin uppskot
6) Ymiskt
7) Lógarbroytingar. Uppskot er frá nevndini.

**S & K felagið**

## Arbeiðshandskar
***til øll endamál - bæði á sjógvi og landi***

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820

## Leys lærarastørv á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya

**2 tíðaravmarkaði lærarastørv fulla tíð frá 15. mars 2006 til 31. januar 2007**
2 lærarastørv eru leys at seta á skúlanum frá 15. mars ella so skjótt sum til ber.

**Lýsing av størvunum**
Arbeiðið sum lærari á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum fevnir m.a. um undirvísing í sjúkrarøkt, vegleiðing í sambandi við uppgávuskriving og verkætlanir. Arbeitt verður í tøttum samstarvi, bæði í toymi, innan samlaða lærarahópin, við kliniska partin av útbúgvingini og við aðrar samstarvspartar.

Útbúgvingin er í støðugari broyting og menning. Sum lærari á skúlanum ert tú við í menningararbeiðinum, og fært soleiðis ávirkan á útbúgvingina og lærarastarvið.

**Fakligt krøv**
Sjúkrarøktarfrøðingur við viðkomandi víðariútbúgving á master ella kandidatstøði.
Sjúkrarøktarfrøðingur við viðkomandi víðariútbúgving á diplomstøði ella sjúkrarøktarfrøðingur við hollum royndum innan undirvísing, hevur eisini møguleika at søkja.

**Førleikakrøv**
- Kunnleiki til føroysku útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing á bachelorstøði
- Royndir innan undirvísing
- Góð samskiftis- og samstarvsevnir
- Kunnleiki til føroysk viðurskifti

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til virkandi rektara á tlf. 304599 lokal 1170 ella 315950

Umsókn við CV og prógvum skal sendast til

**Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya**
Eirargarður 14 B
FO-100 Tórshavn
Merkt: umsókn

Umsóknin skal vera skúlanum í hendi seinast 15. februar 2006.

## Vøruhúsið í Runavík
Soknast eftir vaskifólki at byrja skjótast tilber

Arbeiðið umfatar reingerð av handlinum og møbladeildini

Arbeiðstíðin er í miðal 26 tímar um mánaðin

*Umsóknin skal sendast til*
**Heiðavegur**
**600 Saltangará**

Meiri fæst at vita við at venda sær til Hjørdis Jørgensen á telefon 216185 ella á 448280

**Vøruhúsið í Runavík**